


# Leirvíkingur til arbeiðis á skipasmiðju í Korea

Deil:

Jan Müller

04.07.2014 - 09:28

Oljan.fo

*Tað er vorðið alt meira vanligt, at føroyingar arbeiða í oljuvinnu og tilknýttum vinnum kring allan heim. So er eisini við leirvíkinginum Emil Sofus Jacobsen, sum í løtuni arbeiðir á skipasmiðju í Korea, ið byggir skip til oljuvinnuna í Europa.*

*Seinasta mánaðin hevur leirvíkingurin Emil Sofus Jacobsen verið útleigaður frá Faroe Offshore Service til Samsung skipasmiðjuna í Suður Korea, sum pakka-verkfrøðingar fyri Teekay fyritøkuna, ið byggir eitt av heimsins mest framkomnu FPSO skipum á skipasmiðjuni.*

Petrojarl Knarr er navnið á FPSO skipinum hjá altjóða fyritøkuni Teekay, ið Emil arbeiðir fyri í Korea. Sum pakkaverkfrøðingur er Emil við at leggja tilrættis tey el-arbeiði, ið skulu

gerast umborð á skipinum, til skipið er komið til Europa og klárt til at fara í vinnu á Knarr feltinum á norska landgrunninum.

Petrojarl Knarr varð formelt latið eigarunum tann 30. juni og fer væntandi úr Korea tann 7. juli. Heimferðin verður umvegis Mauritius og Las Palmas, og Petrojarl Knarr skal á feltið í september mánaða í ár.

Í samstarvi við Faroe Offshore Service, og norska felagið Tratec Offshore Solutions, fara føroyskir elektrikkarar og smiðir at verða við á heimferðini og at veita el- og mekaniskar tænastur frá tí, at skipið er komið til Mauritius á veg til Las Palmas og víðari til Norgs.

Avtalan ímillum partarnar fevnir eisini um viðlíkahald á skipinum í eitt ár fram á feltinum í Norra, við møguleika fyri leinging av sáttmálanum. Rotasjónin verður 14 /28.

Kelda: Faroeoffshore.com